Sjúklingar og avvarðandi samd:

# Vit mugu fáa nýtt sjúklingahotel

**Hotel Tórshavn er í so ringum standi, at tað er stór skomm, at føroyskar myndugleikar ikki hava okkurt frægari at bjóða teimum, sum gerast so sjúk, at tey noyðast av landinum, halda sjúklingar og avvarðandi**

HOTEL TÓRSHAVN
*Áki Bertholdsen*



*Her inni gisti ein sjúklingur fyri stuttum. Gólvið er brotið upp, tí arbeitt varð á kamarinum. Hotellið er í so ringum standi, at tað einasta rætta er at flyta og at útvega føroyingum eitt annað sjúklingahotel, siga fleiri sjúklingar og avvarðandi*

Bygningurin, sum føroyska sjúklingahotellið í Keypmannahavn er í, skuldi ongantíð verið leigaður til sjúklingahotel.

Tað eru bæði sjúklingar, sum verða sendir til Keypmannahavar at fáa viðgerð, og teirra avvarðandi, púra samd um.

Síðani umstøðurnar á føroyska sjúklingahotellinum í Keypmannahavn komu til almenna umrøðu í kjalarvørrinum á legionellabakteriunum í vatninum, hevur eitt ótal av sjúklingum, avvarðandi vent sær til blaðið at siga sína ónøgd um hotellið.

Tey, vit hava tosað við, eru yvirhøvur fólk, sum hava verið bæði mangar og langar ferðir á sjúkraferðum í Keypmannahavn, har tey hava gist á Hotel Tórshavn.

Og tey allarflestu, vit hava tosað við, hava eina og somu hugsan um Hotel Tórshavn.

Og tey eru púra samd um at tað var eitt stórt mistak at leiga hetta húsið til sjúklingahotell, tí tað er fullkomiliga óbrúkligt til endamáli.

Talan er bæði um, at hølini liggja illa fyri og at innrættingin ikki er nóg góð, og so tað, at bygningurin er í ringum standi.

Umstøðurnar á hotellinum eru so vánaligar, at tað kemur fyri, at sjúklingar sum hava umstøður til tess, heldur finna sær aðra gisting í Keypmannahavn, heldur enn at fara á hotellið, tí tey stúra fyri, at sjúkan fer at versna av at vera á hotellinum, tí har er bæði svampur og nú eisini, legionella.

Tað er eisini komið fyri, at læknar á Ríkissjúkrahúsinum beinleiðis hava mælt fólki, við veikari immunverju, frá at gista á hotellinum.

Vit vita eisini, at fólk hava vent sær til føroyskar myndugleikar og hava greitt frá støðuni, eisini skrivliga, so tey, sum vara av, vita fullvæl, hvussu statt er.

Sjúklingar og avvarðandi vita, at sagt hevur verið, at nógvir av hesum trupulleikum verða viðgjørdur í samráð við felagið, sum eigur húsið.

Men tað er eitt stórt felag og tað vísir seg at ganga ómetaliga seint at viðgera tey ymsu málini.

– Vit ivast ikki í, at tað verður arbeitt við málinum, men tá ið vit eru á hotellinum, tykist kortini ikki sum um at nøkur framstig av týdningi eru at hóma kortini.

Annars siga tey, at í fyrstuni tóktist tað vera eitt stórt framstig, at flyta í hetta hotellið, men tað var rættiliga skjótt, at glansurin fór av hotellinum, tá ið tey ymisku brekini fóru at vísa seg.

Og sjúklingar eru eisini sannnførd um, at skal nakað gerast fyri at bøta um viðurskiftini, má tað verða myndugleikarnir, sum gera tað.

Onkur hevur róð framundir, at sjúklingar og avvarðandi eiga at gera meiri vart við seg, eitt nú við at stovna eitt sjúklingafelag fyri tey, sum brúka Hotellið.

Men tey flestu spyrja, hvør av sjúklingunum ella avvarðandi hava orku til at stríðast við myndugleikarnar, afturat tí at tey hava sjúku at dragast við.

Fleiri av teimum, vit hava tosað við, vilja vera ónevnd, so vit hava gjørt av at lata øll vera ónevnd.

Eftir teimum samrøðum, vit hava havt við sjúklingar og avvarðandi, kunnu atfinningarnar setast upp í nøkur punkt, sum vit seta upp niðanfyri.

1) Umstøðurnar hjá teimum, sum skulu vera á Hotellinum leingi, eru ótolandi, tí á hotellinum eru bara vanlig kømur. Tað merkir, at fólk, sum eru illa sjúk og skulu vera á hotellinum leingi, hava ringar umstøður at hava avvarðandi við. Nógv dømi eru um at húski, einki hava havt at búleikast í í fleiri mánaðir, uttan eitt kamar upp á einar 12 fermetrar – við børnum ein part av tíðini og tað er ómetaliga strævið hjá røskum fólki og tíansheldur tá ið sjúka er uppi í og sálarliga støðan mangan er ógvuliga vánalig frammanundan.

2) Upprunaliga var ætlanin, at tað skuldi vera nakrar íbúðir til sjúklingar, sum skuldu vera leingi á hotellinum. Men íbúðir eru ongar og tað er ein stórur bági.Høvdu fólk eina íbúð, kundu tey havt gestir undir virðiligum umstøðum og tey kundu eisini matgjørt sjálvi- so at tey fingu tann mat, teimum dámar best og tað hevur ikki so lítlan týdning í eini sjúkustøðu, ikki minst tá ið talan er um sjúk børn.

3) Ventilatiónin virkar als ikki, so tað er ikki livandi um summarið fyri varma. Men tað eru eisini dømi um, at sigaretroykur kemur inn á kømur og wc ígjøgnum ventilatiónsskipanina og tað er ógvuliga óheppið hjá fólki, sum ikki tola royk- og tey eru ikki so fá, har ávísar sjúkur gera, at tey ikki tola royk.

4) Umframt Hotel Tórshavn, eru tað nógv onnur, sum húsast í hesum sama bygninginum. Men í gongini, har lyftirnar eru, er tað ikki hotellið, sum hevur ábyrgdina av reingerðini. Og har hevur reinførið verið út av lagi vánaligt.

5) Svampur er á summum verilsum. Sagt verður, at svampurin er púra óskaðiligur fyri fólk, men tað trúgva sjúklingar og avvarðandi ikki. Dømi eru um fólk, sum hava niðursetta immunverju og sum eru blivin ógvuliga sjúk av at hava sovið á einum av hesum kømurum. Tað eru eisini dømi um fólk, sum eru flutt av einum kamari við svampi í og tað má vera prógv fyri, at tað er ikki heilt óskaðiligt. Tað eru eisini dømi um, sum verða sjúk, so skjótt tey koma inn á onkur av hesum kømurum. Men so skjótt tey flyta í onnur kømur aftur, er alt í lagi, men koma tey inn aftur á eitt kamar við svampi, verður galið. Eitt nú hava bæði sjúklingar og avvarðandi fingið lungnabruna av at sova á einum av hesum kømurum við svampi. Beinanvegin tey koma av kømurunum, liva tey betri. Aðrastaðni, har svampur er, verða hølini stongd og verða ikki brúkt, fyrrenn trupulleikin er loystur.

6) Tað er í heilum, at lyftirnar ikki virka og at fólk sita føst ímillum tvær hæddir. Tað er ikki óvanligt, at fólk hveppa seg við at fara í lyftirnar, tí tey stúra fyri at sita føst.

7) Gáttin í úthurðini er so høg, at hon er aldeilis óegnað til fólk, sum sita í koyristóli. Ein fjøl er gjørd, sum kann leggjast upp eftir gáttini, men tað krevur framvegis at ein avvarðandi er við, sum kann leggja skráan upp eftir gáttini og sostatt ber framvegis ikki til hjá einum, sum situr í koyristóli at sleppa út og inn, uttan at fáa hjálp til tað, men tað eru ikki øll, sum hava fólk við sær, heldur ikki fólk í koyristóli. Nógv teirra eru eisini von at klára seg sjálvi her heima, so tey haav stórt fortreð av at noyðast at biðja onnur um hjálp-

8) Tað er onki fríøki beint við. Sagt hevur verið, at garðurin skuldi gerast til grønt øki, men tað er ikki gjørt enn. Annars liggur økið væl fyri – hjá teimum sum orka. Sagt hevur verið, at tað tekur 10 minuttir at ganga til tok, men so skal gangast skjótt. Fólk, sum hava tikið tíð, siga, at tað tekur 20 minuttir at koma yvir á Ríkissjúkrahúsið, men tað er næstan smárennandi.

9) Spælirúmið til børnini er ikki serliga barnavinarligt og børn trívast ikki inni har. Avleiðingin av tí er, at børn mangan brúka gongina til spælipláss. Viðhvørt fáa sjúklingar og avvarðandi varhugan av, at hesi børn eru í vegin, men tað er onga aðrastaðni at vera, tí onki øki hoyrir til hotellið og inni á einum kamari kunnu børnini ikki vera alla tíðina.

Tað er eisini komið fyri, at onkur av teldunum, sum børnini hava at spæla við, hevur verið í ólagi í fleiri mánaðir út í eitt.

10) Á baðiverilsunum eru flísar á gólvinum, men ongin hiti er í gólvinum og tey, sum hava roynt tað, vita, hvussu kaldar flísar eru, tá ið ongin varmi er í gólvinum.

Sostatt halda sjúklingar og avvarðandi, at frægasta loysnin hevði verið at funnið heilt onnur høli til sjúklingahotel, tí tað er so nógv at gerast við bygningin, sum hotellið nú er í, at tey ivast í, um tað nakrantíð fer at eydnast at fáa Hotellið brúkiligt, hóast ymsar ábøtur verða gjørdar.

Tey minna eisini á, at hjá nógvum sjúklingum og avvarðandi, er Hotel Tórshavn at rokna sum teirra heim í vikur og mánaðir undir umstøðum, sum mangan eru truplar og tyngdar av sjúku og tí má tað verða eitt krav, at umstøðurnar eru virðiligar.



# Bummskipanin bíløgd

**Gjaldskipanin í samband við ferðsluna í undirsjóvartunlinum, tann sonevnda bummskipanin, fer ongar bummar at hava, sigur stjórin**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Tað verður ein bummleys bummskipan, sum skal krevja bummpengarnar um Vestmannasund, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelangum Vágatunlinum.

Tað ljóðar kanska sum ein bummtúrur, leiðslan hevur gjørt, tá hon hevur biðið um tilboð upp á gjaldskipanina. Men skipanin er umbiðin og farin í framleiðslu, sigur Dávur Reinert Hansen, Og eingin bummur veður yvirhøvur at lyfta upp, tá farið verður gjøgnum tunnilin.

Talan er um eina gjaldskipan, har tríggir ymsir møguleikar verða í, greiðir stjórin fyri Vágatunnilin frá. Ein sonevnd »abonnementskipan«, har til ber frammaundan at keypa eitt ávíst túratal. Ein skipan, har goldið verður við gjaldskorti fyri hvønn túr sær. Og so ein skipan, har ein kann fáa eina rokning útskrivaða á staðnum fyri síðan at gjalda eitt nú á posthúsi ella peningastovni.

– Tað fer ikki at bera til at gjalda á staðnum við reiðum peningi, sigur Dávur Reinert Hansen.

Skipanin verður soleiðis, at økið veður eftiransað av upptøkutólum, soleiðis at allir bilar og persónar, sum ferðast um skipanina, verða avmyndaðir. Ferðsluljós verða sett upp, sum leiða ferðsluna, soleiðis a t tey, sum ætla at gjalda fyri tann einstaka túrin við korti, verða leidd hagar, tað skal gerast. Tey, sum hava goldið frammaundan, hava eitt frámerki í rútinum á bilinum, sum verður avlisið, og síðan verður tikið av konto fyri tann túrin.

Hini, sum ikki hava kort, veðra beind í eina geil, har tey fáa útskrivaðað eina rokning, sum so skal gjaldast sum skjótast.

Dávur Reinert Hansen, sigur, at slíkar skipanir hava fyrr verið nýttar aðrastaðani við góðum úrslitum.

Umframt sjálvvirkandi gjaldsskipanina, verða kortini eftirlitsfólk á staðnum av og á, sum fara at taka stakroyndir av teimum, sum koyra um skipanina.

Eisini verður fólk støðugt á staðnum ta fyrstu tíðina opið er, at vegleiða tey, sum fara at koyra, soleiðis at ferðslan kann ganga so smidliga sum gjørligt.

Tað er eitt norskt felag, sum hevur fingið til uppgávu at gera skipanina. Hvussu hon fer at síggja út, er eisini nakað, hetta felagið skal finna fram til.

Hetta felagið hevur gjørt tær flestu skipanirnar av slíkum slag, sum brúktar verða í Noreg, sigur Dávur Reinert Hansen.

Hann sigur, at skipanin verður klár til tann 26. november. Og loyvini at seta hana upp í haganum, eru fingin, sigur hann. Tey vórðu givin, tá fyrsta tunnilsætlanin var fyri í áttatiárunum, og Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at tey verða flutt til partafelagið Vágatunnilin.

Í samband við gjaldsskipanina fer Vágatunnilin at gera upplýsingartilfar, sum verður almannakunngjørt, nakað áðrenn tunnilin verður latin upp, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunlinum.



*Gjaldskipanin í samband við undirsjóvartunnilin er bíløgd og verður klár til tann 26. november, sigur stjórin fyri tunlinum, Dávur Reinert Hansen*

# Arktiskt veðurlag í Føroyum



*Veðurlagsmátistøðin á Sornfelli er tann hægsta í landinum. Hon hevur vísindaliga staðfest, at vit hava arktiskt veðurlag í Føroyum*
*Mynd: Jarðfrøðisavnið*

**At stórir partar av Føroyum hava arktiskt veðurlag, er nú vísindaliga staðfest. Hóast vit vanliga siga, at Føroyar liggja í tempereraða økinum, hava vit vitað, at veðurlagið er kaldari enn so, sigur granskari**

VEÐURLAGS-KANNING
*Edvard Joensen*

Nú er vísindaliga staðfest, at vit hava arktiskt veðurlag í Føroyum. Kanningar hava seinastu trý árini verið gjørdar á Sornfelli, og úrslitið vísir greitt, at veðurlagið har uppi er arktiskt.

– Vit hava leingi vitað, at veðurlagið á føroysku fjøllunum er arktiskt og ikki tempererað, sum flestu lærubøkur annars siga, greiðir Lis Mortesen, á Jarðfrøðisavninum ,frá. Men ikki fyrr enn nú er tað staðfest við kanningum.

Jarðfrøðisavnið setti í 1999 eina veðurlagsmátingarstøð upp í 726 metra hædd á Sornfelli. Støðin mátar veðurlagið har uppi, so sum vindferð og ætt, lufttrýst og hita.

Hetta er fyrstu ferð, ein veðurmátingarstøð hevur verið so ovalaga í Føroyum, greiðir Lis Mortensen frá. Tann, sum hægst hevur verið undan hesari, var á Norðadalsskarði. Hon stóð í 282 metra hædd. Men tað varð ikki hildið at vera nøktandi til at máta veðrið á fjøllunum ella fyri tann skuld í landinum yvirhøvur, tí heili 60 prosent av føroyska landaøkinum liggur hægri enn so.

Tí varð støðin á Sornfelli sett upp, og hon hevur so givið tey úrslit, sum nú kunnu vísast á sum prógv fyri tí, føroyingar leingi hava vitað. Nevniliga at vit í grundini hava arktiskt veðurlag so ovarlaga í Føroyum.

Fíggingin, sum fekst til verkætlanina, røkkur til eini tvey ár afturat. Men á Jarðfrøðisavninum vóna tey, at til ber at fáa meira pening, soleiðis at kanningarnar kunnu halda fram eina tíð enn, so neyvari tøl verða at vísa á.

Kanningarnar higartil hava víst, at hitalagið er rættiliga svingandi á fjøllunum. Til dømis varð meðalhitin ár 2000 máldur til at vera 1,7 stig fyri alt árið á Sornfelli. Mesti hiti var tað árið máldur til umleið 15 stig har uppi, meðan mátarin var niðri á umleið 11 kuldastigum, tá kaldast var, greiðir Lis Mortensen frá.

Tað krevur nógva røkt at hava eina støð standandi so høgt. Men við ymsum snildum er funnið fram til eina skipan, har mátiinstrumentini eru goymd í eini lítlari tunnu og síðan verða lyft upp tvær ferðir hvønn tíma at gera kaningarnar, sum gerast skulu.

– Hetta hevur riggað væl, sigur Lis Mortensen, og hava vit fingið áhugverd úrslit haðani.


## Vaktarskifti

Í samband við at Ole. R. Lauritsen eftir 30 árum, fer frá sum Bureau Veritas sýnsmaður og Tummas Eli Høj Joensen tekur yvir sum Bureau Veritas sýnsmaður, verða øll viðskiftafólk, fyrrverandi, verandi og komandi bjóðaði til móttøku á Hotel Hafnia fríggjadagin 27. september kl. 14.30 - 17.00

Ole R. Lauritsen og Tummas Eli Høj Joensen